## HEILSANIR



**Góði Johannes abbi**
Hjartaliga tillukku á 60 ára degnum.
**Ynskir lítli Johannes**



**Nú Petur Henry**
Tú fekst hvørki musikalsk evnir ella konufólk! Hvat feilar tær? Kom í gongd!



Hesin fjallmaðurin verður 35 ár. Nær fer tú á knæ? Vit bíða spent.
**Ynskja vit sum koma í ballið**



**Góði babba, verfaðir og abbi**
Tær verður ynskt lukku og gleði á tínum 60 ára degi.
Ynskja vit tær
**Hildubjørg, Lennart, Angela og Daniella**



**Góði Meinhard**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum mánadagin 30. aug.
**Bestu heilsanir frá ommu og abbi á Glyvrum**



**Góða Ruth**
Hjartaliga tillukku á 21 ára føðingardegnum.
**Ynskja babba, mamma, Petur, Ruth og Høgni**

## TILTØK

**Gudstænastur**
**12. sunnud. eftir trinitatis**
*Christianskirkjan:* kl. 11, Hans Eiler Hammer
*Haraldssund:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Kvívík:* kl. 12, altarg., (skriftarmál kl. 11.50), Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 11, altarg., Mogens T. Christensen
*Elduvík:* kl.12, altarg., Uni Næs
*Skála:* kl. 11, altarg.,
*Selatrað:* kl. 17, Kingosangarar úr Tjørnuvík – aftaná gudstænastuna smurt breyð í missiónshúsinum. Jógvan Fríðriksson
*Vágur:* kl. 11, altarg.,
*Eldrasambýlið í Vági:* kl. 15, Patrick de Neergaard
*Miðvágur:* kl. 11, altarg., David Johannesen
*Norðskála:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa, Emil Olsen
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, talvan gongur fyri Sunnudagsblaðið, Martin R. Jacobsen
*Viðareiði:* kl. 11, (útvarpað), Elsa Funding
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Nólsoy:* kl. 12, Jóannis Fonsdal
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen. Talvan gongur fyri KFUM í Havn
*Argja kirkja:* kl. 11, Bergur D. Joensen
*Sandur:* kl. 12, Sonja Klein
*Rituvík:* kl. 11,
*Glyvrar:* kl. 15 familjugudstænasta
*Søldarfjørður:* kl. 18, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Tvøroyri:* kl. 11 Familju- og barnagudstænasta Jónsvein Bech

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúlin byrjar aftur, kl. 18 Evangel. møti.
Týsdagin kl. 20 Sangvenjing.
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni kl. 14 og sunnukvøldið kl. 18 Møti í missiónshúsinum.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti, har Sverri Steintún talar. www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardagin kl. 11 Útimøti – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 Familjumøti har skótarnir skipa fyri. EKKO frá Noregstúrinum, drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 9.30-12 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Ejvind Mouritsen, Gratia syngur.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Absalon Áargarð talar um endamálini hjá Lívdini – samfelag.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jákup Jacobsen um endamálini hjá Lívdini – læra.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini. www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 22 Bøn fyri býnum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Fríggjadag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 8 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Pater Tuomo Vimpari í Mariukirkjuni. Talvan gongur fyri hjálparfelagsskapin Caritas Denmark.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Verið her og vakið við mær, vakið og biðið«.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Símin Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC v/ Fríðtór Debes, evnið er: Trúgv (yvirhøvur) 1. partur, kl. 18 Møti, kl. 22 Útimøti á vaglinum.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí frá kl. 8-16. www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Niels Jacob Nielsen trúboðara. Evnið: Óbadia profetur.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 19 Møti v/ Rúna Mortensen, Argir.

**Saron, Vestmanna**
Morgunmøti og breyðbróting við Fríðbjørn Poulsen. Jón Miðberg talar. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 19 Møti við hósvíkingum við talu og sangi.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við luttakarum frá »TeenStreet«.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Paula Høj. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

## BRÚDLEYP

Leygardagin 18. september kl. 15.00 giftast í Glyvra kirkju Elsebeth Ragnhardsdóttir Hansen, Saltangará og Jørgin Jacobsen, Leirvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. september á tlf. 503305, 447830 ella 443176.

## 90 ÁR

Sunnudagin 5. september verður Elydia Haldansen, Vestmanna 90 ár. Føðingardagurin verður hildin Millum Gilja 46, Hoyvík frá kl. 16.00 sama dag.

## GULLBRÚDLEYP

19. september hava Jórun og Petur Meinhard Jacobsen, Skipanes gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 14. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið kunnu ringja 441288, 448968 ella 449498 innan 11. september.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Eg eri lívsins breyð. Tann, sum kemur til mín, skal ikki hungra, og tann, sum á meg trýr, skal aldri tysta!«.*
*Jóhs. 6, 35*

Tað er Jesus, sum sigur hetta um seg sjálvan. Jesus er matur og drekka okkara. Hann er okkara grundvøllur. Vit hava ikki bara tímiligt ella dagligt breyð fyri neyðini. Vit hava eisini andligt breyð fyri neyðini. Jesus segði jú einaferð, menniskjan livir ikki av breyði eina, men av hvørjum orði, ið gongur út av Guds munni.

At fáa eyga á henda veruleika er sannur lívsvísdómur. Trúgvin sær henda veruleika í eyguni. At trúgva er at síggja, at Jesus ikki bara hevur sagt sannleikan til okkum, men tað er at síggja, at hann er sjálvur sannleikin til okkum. Hann er við øðrum orðum lívsins breyð. Hann er okkara tilverugrundarlag. Og tann, sum trýr á hann, skal hvørki hungra ella tysta.

Tað er at eiga lívið og tað er at eiga framtíðina. Hetta lívsins breyð fáa vit á serligan hátt við altarborðið. Har verður sagt, hetta er likam mítt og hetta er blóð mítt til fyrigevingar syndanna. Vit fáa Jesus sum frelsara við Harrans borð. Har fáa vit allan Jesus og tað, hann og gerningur hansara merkja.

Vit fáa lív og sælu.

Trúgvin kemur aftrat og tekur ímóti. Tí uttan trúnna gagna sakramentini ikki. Vit prædika ikki bara sakramentir, heldur ikki basra trúgv, men vit prædika sakramentir og trúgv. Bæði hoyra saman, um vit sklu prædika ta heilnæmu læruna. Jesus er lívsins breyð. Hann gevur seg sjálvan til okkum. Orðið um krossin sigur okkum hetta og gevur okkum hetta.

At trúgva er at gera frelsunnar gávu til sína gávu. og tað er at liva við Jesus hvønn dag, alt til Harrans dag. Tað er at lata seg sannføra til trúgv, kærleika og vón hvønn dag. Tað er við øðrum orðum at móttaka Guds góðu gávur og geva tær víðari í tí samanhangi, vit liva sum kristin.

Men framum alt eru lívið og frelsan gávur frá Gudi til okkara og vit eiga hesar gávur bert við at geva tær til næstan dag og dagliga.

Takka Gudi tínum fyri lívsins og frelsunnar gávur, t`í tað er at trúgva!

Amen.

**David Johannesen**



## TILTØK

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Pola Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Hugnaløta**
Leygarkvøldið kl. 20 Hugnaløta við sangi og vitnisburði í felagshølunum hjá Hæddini, Saltangará. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hvalvíkar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Martin R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Evnið verður Dánjal 2. partur við Alfred Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.jesus.fo

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti v/ Ásbjørn Jacobsen, kl. 21 Ungdómsmøti v/ Hans Kristian Johannesen.
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.
Týskvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Aksel Zakariassen, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Hjalgrím Davidsen.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sands missiónshús**
Sunnudagsskúli sunnumorgunin kl. 10.30. Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Verið vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti Árna Kjærbeck og Denny Debes. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 talar Eivind Bech. Verið vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur – um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Útimøti í Fámien leygarkvøldið kl. 20.
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Terja Nielsen, hjartaliga vælkomin.

**Hirtshals**
Føroyskt møti verður í missiónshúsinum sunnudagin 29. aug. kl. 18 v/ Torleifi Johannesen, sjómanstrúboðara.
Danskt møti verður í missiónshúsinum sunnudagin 5. sept. kl. 19.30 v/ Hera Elttør, trúboðara.
**Randers**
Mánadagin 6. sept. kl. 19.30 verður føroyskt møti hjá Sóley og Atla Dáva Nattestad, Kristrupvej 38b, 1. sal, Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari talar.
**Århus**
Týsdagin 7. sept. kl. 19 verður føroyskt møti hjá Malene og Símin Jacobsen, Moltkersvej 10, 1 th. Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari talar. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 30. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Myndaveving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 31. august*
kl. 10-11.30 Vit syngja, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Ábyrgd fyri egnari heilsu, Jóannes Hansen, studentaskúlalærari
*Mikudagin 1. september*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur út á Tinganes. Bette Johansen. Tilm. 316491
*Hósdagin 2. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 3. september*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Vága Gongufelag**
Um viðrar ger Vága Gongufelag túr sunnudagin kl. 14 niðan á Malinstind-Heldarstind. Byrjað verður frá Nullinum. Havið góð gonguklæðir við. Tilmelding á Kunningarstovuni og Kunningardiskinum.

**Frá Ferðavinnuni í Suðuroy**
Gongutúrur úr Porkeri til Hov verður leygardagin 28. august. Bussur koyrir av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10 og av Kunningarstovuni í Vági (gamli skúli) kl. 10.30. Eftir loknan gongutúr verður koyrt við bussi úr Hovi til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági.
Tilmelding til túrin skal gerast á Kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342/284342 ella á Kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480/284480 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 16.00.

**Felagið Tórshavn – Spákingartúrur**
Leygardagin 21. august verður gingið úr Svanga eftir Grønlandsvegnum og vitjað verður á Restorffs Bryggjaríi. Byrjað verður við Tekniska Skúlaheimið kl. 14.00.
**Tilmelding.**
**Sunnudagin 29. august:**
Í Dalar úr Vestmanna eftir Fjallinum. Langur og tungur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.00.
Tilmelding.

**Frá Eysturoyar Gongufelag**
Farið verður til Hetlands hósdagin 16. september og komið verður aftur mánadagin 20. september. Kostnaður íroknað ferðing og gisting:
Í 4 koyggjukamar umborð á Norrønu + 2 nætur á hotel í Lervick (Hotel Shetland, Grand Hotel ella Queens Hotel) í dupult kamar kr. 1500 (einkult kamar á hotellinum 250 kr. eyka pr. nátt). Tilmelding á Kunningarstovunum í Eysturoynni innan hósdagin 2. september, Runavík tlf. 449449 infoey-r@post.olivant.fo og Fuglafjørður tlf. 444860 infoey-f@post.olivant.fo

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
byrjar aftur mikudagin 1. september til vanliga tíð.
Opið er frá kl. 14.00-17.00.
Drekkamuður er at fáa.
Bløðini eru til taks.
***Mikudagin 1. september***
Vit tosa um Noregstúrin.
Vit tosa um, hvat vit skulu gera í vetur.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.


**HARLEY DAVIDSON TIL SØLU**



Harley Davidson FLH Electra glide
1340 · cc. árg. 1972 · koyrt 9000 miles
til sølu um hóskandi boð fæst.
**Tel 281000**

**Familjubilur til sølu**



Toyota Corolla Verso árg. mars/2002. Koyrt 46.000 km
Hevur m.a. sentrallás, innb. barnasetur aftan,
el-rútar framman. Hevur verið til øll tænastueftirlit.
1/2 árs garanti er eftir.
Eyka sett av felgum við vetrardekkum fylgja við.
Sera vælegnaður sum familjubilur.
Prísuppskot 170.000,- *Tel 21 14 39*


**Klaksvíkar kommuna**

**Broyting av øki A innan fyri 3. grundlendi á Norðoyri.**

A-økið verður víðkað suðureftir, niðaneftir og heimeftir.

Við hesum verður kunngjørt sambært reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mei 1954, at Klaksvíkar býráð á fundi 29. juni 2004 hevur samtykt at víðka bústaðarøki A innan fyri 3. grundlendi á Norðoyri, soleiðis:

Umleið 150 metrar suðureftir, suður ímóti matr. nr. 44.
Umleið 50 metrar niðanum bøgarðin, omanfyri og sunnanfyri verandi útstykking.
Í gomlu bygdini verður økið víðkað umleið 30 metrar niðanum gamla bygdavegin frá matr. nr. 32a og heim at Oyragørðum.

Broytingin liggur frammi til alment eftirlit á býráðsskrivstovuni inntil 29. september 2004.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu verða býráðnum í hendi seinasta lagi 29. november 2004 fyri at koma við í býráðsins endaligu viðgerð av broytingini.

Klaksvík 26. august 2004

**Klaksvíkar Býráð**





Starvslýsing

**Søkt verður eftir dugnaligum fólki við handilsroyndum at arbeiða 3/4 tíð í gávubúð okkara.**

**Prógv, ummælið o.a. verða at senda innan 10.sept. 2004 til:**

Thomas Dam á Hálsi,
Postboks 2148
110 Tórshavn.

Eru spurningar ring: 266777

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Sosialurin
-tað loysir seg